Samgongugrundarlag aftaná løgtingsvalið 7.november 1970.

1. Fyri at økja um inntøkur landsins og geva samfelagnum so væl sum einstaklinginum størri fíggjarmegi, verður hildið fram og skundað undir endurnýggjan, umleggjan og rationaliseran av fiskiskipaflotanum við ídnaðartrolarum, flakatrolarum, størri og smærri útróðrarbátum, kraftblokkabátum og øðrum veiðiførum.

   Spurningurin um umleggjan til aðra vinnu av tí parti av veiðuflotanum, sum í løtuni er ringast fyri, verður at greiða skjótt og effektivt.

   Virkað verður fyri eini veruligari ídnaðarútbygging, soleiðis at skilja, at loyvt verður at føra ein "egnsutviklings"-politikk.

   Alment initiativ til at fáa stovnað ídnaðarvirkir skal kunna takast. Áherðsla verður løgd á at kanna ymisk prosjekt, sum kunnu hugsast at hava livilíkindir í Føroyum.

   Umhugsað verður at broyta studningsskipanina og avskrivingarreglurnar soleiðis at betri støði verður undir "egnsútviklinginini".

   Bygging av størri og smærri farmaskipum verður at stuðla og møguleikin fyri samvinnu við aðrar, t.d. danir, verður at kanna, soleiðis at skundað verður undir málið sum ein felagsuppgáva.

   Strembað verður ímóti at veita fiskimonnum, øðrum sjómonnum, arbeiðsmonnum og arbeiðskvinnum bestu inntøku-, arbeiðs- og lønarkor.

2. Roynt verður framvegis á einhvønn hátt at verja og víðka okkara veiðu- sølu- og arbeiðsrætt hjá grannatjóðum okkara. Grønlandsrættindini verða at verja og víðka, sum ríkisfelagsskapurin eigur at tryggja okkum.

3. Sosiallóggávan verður at fullfíggja.

4. <u>Skattalagið</u>.
Neyðturvuligar ábøtur, herundir hækkan av barnafrádráttinum og reguleran av skattastiganum verða at fremja beinanvegin, soleiðis at láginntøkum verður veittur lætti.

Hildið verður fram við at kanna skattingarháttin, herundir kelduskatt, umsetingargjald og skatting av partafeløgum.

5. Íbúðarspurningurin og byggilóggávan verða at nýskipa, miljø-planlegging at gera og grundstykkjaspurningurin at taka til viðgerðar.

6. Føst ætlan verður gjørd fyri samferðsluútbyggingina og skundað verður undir at fáa umbygt og asfalterað eldri vegastrekkir.

Uttanlandasamferðsluviðurskiftini verða at loysa skjótast gjørligt. Innanoyggja flogferðsla verður umhugsað.

7. Ungdóminum verður veitt bestu lærukor. Lærlingaviðurskiftini verða at umskipa við fyrimynd úr øðrum londum, m.a. at stytta um lærutíðina og effektivisera hana, so lærlingurin fær tað sama ella meira burturúr styttu lærutíðini.

Kvøld- og ungdómsskúlalógin verður endurskoðað og løgd fyri tingið.

Neyðugar broytingar í sjómansútbúgvingini verða at fremja.

8. Miðvísur mentunarpolitikkur verður førdur.

9. Farið verður undir at fyrireika bygging av nýggjum løgtings- og umsitingarhúsi.

Bóka- og skjalasavnspurningurin verður at loysa.

10. <u>Marknaðarmál</u>.
Um tingið samtykkir samráðingar við E.E.C. skal føroyska heimastýrið taka beinleiðis lut í samráðingunum. Um neyðugt, verður serkøn hjálp at læna frá uttanríkisráðnum.

11. Arbeitt verður fyri javnbjóðis umboðan í Norðurlanda ráðnum.

12. Umleggjan av umsitingini.

13. Roynt verður at fáa á stovn felags keyp av skipsbyggitilfari.

14. Lóggávan viðvíkjandi vinnufeløgum verður at viðgera (kommanditfeløg).

15. Viðgerðin av lønarlagnum heldur fram (tænastumannalógin).

16. Vaktar- og bjargingarskip verður at byggja.
Arbeiðið við at fáa eitt nýtt havrannsóknarskip heldur fram.

17. Lækna-, hospitals- og sjúkrarøktarskipanin og øll heilsumál verða at halda á hædd við tað besta í ríkinum.

18. Kanningararbeiðið viðvíkjandi kommunusamanlegging heldur fram, og býarplanlegging verður framskundað. Nýggj ekspropriasjónslóggáva verður umhugsað.

19. Í tingsetuni 1948 samtykti løgtingið at yvirtaka postverkið. Rakstur postverksins verður at kanna.

20. Virkir, sum hava serligan arbeiðsskapandi týdning, mugu ikki steðga vegna fíggjar- ella aðrar kreppur. Í tílíkum førum fær landsstýrið heimild til at skipa fyri, at raksturin heldur fram, meðan orsøkirnar til trupuleikarnar og møguleikarnir framyvir verða kannað.
Um skip koma í líknandi støðu, verður í hvørjum einstøkum føri tikin avgerð um, um raksturin skal halda fram fyri landskassans rokning.

21. Arbeiðið við stovnsetan av sjónvarpi heldur fram.

Í øllum málum av týdningi, har landsstýrið tekur initiativ, eigur samgongan at verða orienterað í góðari tíð, so tingmenn innan samgonguna áðrenn aðrir hava kunnleika til málið.

Tórshavn, 8. desember 1970.

| fyri JAVNAÐARFLOKKIN | fyri SAMBANDSFLOKKIN | fyri SJÁLVSTÝRISFLOKKIN |
|---|---|---|
| [signature] | [signature] | [signature] |